BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

16. august 2024
Mál: 22/22133-80
Viðgjørt:

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-008/2024 frá Liljuni Weihe, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um børn og ung, sum verða send av landinum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv børn og ung, sum koma undir ábyrgdarøkið hjá landsstýrismanninum, eru flutt av landinum seinastu 5 árini?
2. Hvussu nógv eru farin "sjálvboðið" á t.d. eftirskúla ella annan stovn í Danmark?
3. Hvussu nógv hevur hetta kostað?
4. Í hvønn mun senda kommunalu barnaverndartænasturnar børn og ung av landinum uttan um landsmyndugleikan?
5. Hvussu vil landsstýrismaðurin tryggja, at vit frameftir taka okkum av okkara egnu borgarum?

Svar

Til 1 og 3: Í 2019 vóru tað 7 ungdómar, sum høvdu pláss á samdøgursstovni í Danmark sambært barnaverndarlógini.

Eftirfylgjandi hevur talið verið 7 (í 2020), 5 (í 2021) 6 (í 2022) og í 2023 var talið 4.

Viðmerkjast skal, at uppihaldið hjá hvørjum borgara í flestu førum gongur yvir um ár.

Tann 14. august 2024 hava 2 børn pláss á samdøgursstovni í Danmark.

Tað er Føroya Kærustovnur, áður Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið tekur avgerð um pláss á samdøgursstovni sambært barnaverndarlógini. Almannaverkið umsitur játtanina.

Til 2 og 4: Barnaverndartænastunar hava ikki hagtøl fyri, hvussu ofta tær hava játtað at gjalda heilt ella partvíst fyri uppihald á t.d. eftirskúla í Føroyum ella Danmark.

Barnaverndartænasturnar hava møguleika at seta ymsar fyribyrgjandi fyriskipanir í verk í barnaverndarmálum, og eitt uppihald á eftirskúla uttanlands er ein partur av fyriskipanum, sum kunnu setast í verk sambært § 15 í barnaverndarlógini.

Slík fyriskipan kann bert verða sett í verk við samtykki frá foreldramyndugleika og barni, sum er fylt 15 ár. Hetta er ikki ein fyriskipan, sum verður ofta nýtt, men tað kunnu vera umstøður í heiminum, ella hjá barninum, sum eru orsøk til, at slík fyriskipan verður mett gagnlig fyri barnið. Talan er tískil ikki um, at ein trupulleiki verður fluttur av landinum, men heldur um, at børn, sum eru partur í einum barnaverndarmáli, eins og onnur børn, skulu hava møguleika fyri at fara á eftirskúla at menna seg persónliga. Talan er tí um ein møguleika og eitt tilboð.

Til 5: Tað er eitt av aðalmálunum at veita hóskandi tilboð í Føroyum til børn og ung sambært barnaverndarlógini, soleiðis at vit ikki noyðast at veita tænastuna uttanlands, og tølini til spurning 1 og 3 geva eina ábending um, at vit í størri mun megna hetta í Føroyum nú enn fyri tíð síðani.

Landsstýrismaðurin fegnast um, at vit tey seinastu 4 árini hava fingið tveir nýggjar samdøgursstovnar í Føroyum, ein samdøgursstovn til ung við etingarólagi, og ein stovn til ung, ið sjálvskaða seg. Hetta hevur havt við sær, at vit nú kunnu veita hesi tilboð í Føroyum heldur enn at veita tilboðið uttanlands.

Orsøkin til, at vit veita tilboð uttanlands, er, tá tann ungi hevur so mikið umfatandi tørv, at vit ikki meta okkum at kunna veita nøktandi tænastu í Føroyum. Slíkar avbjóðingar krevja servitan og royndir, sum vit ikki hava. Sama avbjóðing sæst eisini í donskum kommunum, har kommunurnar keypa spesialiseraða tænastu frá hvørjum øðrum og frá regiónunum. Hetta tí, at tað krevur eina ávísa mongd av borgarum fyri at uppbyggja og halda við líka tað høga fakliga og spesialiseraða støði, ið krevst.

Landsstýrismaðurin metir tað tó vera av stórum týdningi, at vit áhaldandi gera neyðugar íløgur innan barnaverndarøkið og stovnar innan hetta øki, soleiðis at vit fáa gagnnýtt ta vitan, vit longu nú hava, umframt at vit tryggja okkum ta servitan, vit ikki hava.

Vinarliga

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður